# Fólkatingsformaðurin vitjar føðistaðið

**Formaðurin í danska Fólkatinginum Christian Mejdahl varð sunnudagin ynsktur vælafturkomin til Tvøroyrar, har hann varð føddur í 1939**



*Jónsvein Bech, prestur, og Christian Mejdahl, fólkatingsformaður, í kirkjuni á Tvøroyri. Christian Mejdahl varð føddur á Tvøroyri og vitjar í sambandi við árliga fundin hjá formansskapinum í Fólkatinginum og formansskapin Løgtinginum*

*Mynd: Leivur Nygaard*

Formansskapirnir í Løgtinginum og Fólkatinginum hava í hesum døgum sín árliga fund. Í ár er fundurin í Øravík, og sunnudagin vóru fundarluttakararnir í kirkju á Tvøroyri.

Jónsvein Bech, prestur, bjóðaði í prædikuni formansskapinum í Løgtinginum og Fólkatinginum vælkomnum á gudstænastu:

– Derfor vil jeg gerne benytte lejligheden til at ønske jer vores gæster hjertelig velkommen til at være med til gudstjenesten her i dag. Og jeg håber, at den - sammen med det traditionelle St. Hans stævnet, som er i byen denne weekend, er med til at gøre mødet og opholdet her til en god oplevelse for jer.

– Uden at gøre forskel, så vil jeg alligevel tillade mig at ønske dig formanden for Folketinget Christian Mejdahl at være "væl afturkomnan", som vi siger på færøysk, når vi hilser på en efter lang tids fravær.

– Som bekendt er du født her i Tvøroyri nytårsaften 1939 – jeg kunne ikke lade være at skele lidt i kirkebogen –, hvor din far var den første præst, som havde bosted her på stedet.

– Jeg har ladet mig fortælle en anekdote, hvordan det gik til. Din far havde nytårsaftensgudstjeneste her i kirken, og stod her på prædikestolen, da formanden for menighedsrådet pludselig kom ind i kirken med en seddel i hånden, som han fik smuglet op på prædikestolen til din far. På den stod skrevet: Det blev en søn.

– Og selvom du kun var 5 1/2 år, da I flyttede tilbage til Danmark, så går jeg ud fra, at for dig som for de fleste andre vil fødestedet, og der hvor man har fået lov til at leve sine første barndomsår, altid være en del af ens identitet. I denne kirke fik du også din identitet som kristen, da du er døbt her. Og jeg ved at disse identiteter betyder meget for dig.

– Det er jo heller ikke første gang du er her igen. Selvom mange af os ikke har haft anledning til at lære dig personlig at kende, og der ikke er mange tilbage af venner og bekendte fra dengang, I boende her, så var der alligevel mange her som følte, da du fik betroet det betydningsfulde hverv at være formand for Folketinget, at du var en af vore, og som derfor dine vegne var stolte og glade. Og herfra vil vi ønske dig god lykke og Guds velsignelse i denne tjeneste. Og for jer allesammen et fortsat godt ophold her.

# Jóansøkufestivalurin eydnaðist sera væl

**Eini 900 fólk leitaði sær á jóansøkufestival á Tvøroyri, siga fyrstu leysligu metingarnar. Serliga var tað høvuðsnavnið Sweet, ið dró lurtarar í øllum aldursbólkum**

JÓANSØKU-FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Sweet á palli. Teir viðmerktu eittnú frálíka og vakra útsýnið av pallinum. Bæði tónleikarar og teir umleið 900 áhoyrararnir hugnaðu sær á Jóansøkufestivsalinum*

Jóansøkufestivalurin eydnaðist sera væl. Eini 900 fólk leitaðu sær á jóansøkufestival, siga fyrstu leysligu metingarnar. Eini 400 atgongumerki vórðu seld í forsølu.

Serliga var tað Sweet, ið dróg. Umboð fyri flest allar aldursbólkar leitaðu sær á jóansøkufestival og serliga Sweet dró. Festivalurin byrjaði klokkan 18 í fagrasta veðri og helt á til midnátt, tá dansur byrjaði bæði í Tvøroyrar Klubba og í Trongisvágshøllini.

Sweet rockaði, men eisini Nylon hevði góða framførslu og føroysku nøvnini, sum Makrel, DejaVu, The Dreams og Paradox settu eina stóru striku undir nøvn síni og vístu, at har er veruliga nakað serstakt, ið vert er at leggja oyru til. Føroysku nøvnini spældu sera væl og var tiltakið tí eisini væl eydnað í enda í annan. Veðrið var eisini gott og helt sær, so eittnú útsýnið av festivaløkinum kom til sín rætt.

Fyrireikararnir eru stak væl nøgdir við at so nógv fólk leitaðu sær á Jóansøkufestival og eisini við tónleikaðiligu síðuna av tiltakinum. Høvuðsnavnið var í toppformi og uttan mun til aldur ella forkunnleika, so bar til at hugna sær við dygdar rocktónum frá nøkrum av teimum, ið nærum hava verið við frá byrjan.

Og serliga gleðiligt var, at so nógvar av pisunum settu dám á festivalum við hvítum húgvum av alskins salg og við sera góðum hýri, siga fyrireikararnir.

Stór frásøgn verður í blaðnum í morgin.